

*Boðini frá báðum teimum føroysku fólkatingslimunum í viðmerkingunum til setanarrøðu Nyrups vóru greið. Nú skal glið fáast á ríkisrættarligu samráðingarnar*

# Fáið nú gongd á

*Báðir teir føroysku fólkatingslimirnir heittu hóskvøldið á donsku stjórnina um at fáa gongd á aftur samráðingarnar um framtíðarstøðu Føroya. Áheitanin var borin fram í Fólkatinginum undir orðaskiftinum um setanarrøðu forsætisráðharrans.*

Magnus Dam
Keypmannahavn

Hóast teir eru ósamdir um endaliga málið, so eru Óli Breckmannn og Jóannes Eidesgaard samdir um, at eitt úrslit nú má spyrjast burturúr samráðingunum millum landsstýrið og stjórnina.

Óli Breckmannn heldur, at partarnir nú mugu royna at fáa greiðu á teimum málunum, sum semja tykist vera um, og Jóannes Eidesgaard heldur, at føroyska fólkið nú má sleppa at taka støðu til eitt ella annað úrslit.

Teir umboða ávikavist samgonguna og andstøðuna í Føroyum, men hvørgin teirra er nøgdur við samráðingargongdina.

Óli Breckmann fanst í røðu sínari serliga at donsku stjórnini, tí hon ikki hevur eftirlíkað føroyska ynskinum um longri skiftistíð. Og fólkatingsmaðurin er sera ónøgdur við, at tað hevur gingist so striltið hjá pørtunum at finna eina semju um búskaparliga partin. Tað, sum nú liggur á borðinum er ikki nóg gott, heldur Óli Breckmann.

– Løgmaður hevur sagt alment, at hann ikki ætlar at leypa út í hylin uttan fyrst at tryggja sær, at vatn er í hylinum. Og støðan hjá løgmanni er hervið endurtikin av Fólkatingsins røðarapalli. Tað verður altso ikki nøkur fólkaatkvøða um føroyskt fullveldi, um meirilutin ikki frammanundan er vísur, segði Óli Breckmann.

Óli Breckmann ásannaði, at tað ikki slepst longur í spurninginum um skiftistíðina.

– Tríggjar ferðir hevur landsstýrið samráðst við stjórnina við sama samráðingarupplegið — og tað var kanska eina ferð ov nógv. Men uppleggið er so roynt. Vit eru nú kroyst til at boyggja okkum fyri hesum og taka undir við einari fýra ára langari skiftistíð, um vit ynskja fullveldi her og nú. Á henda hátt hevur forsætisráðharrin í stóran mun ávirkað tað valið, sum hann pástendur, at Føroya fólk einsamalt skal avgera.

## Skeiv raðfylgja

Jóannes Eidesgaard minti í sínari røðu á, at sjálvstsýri ikki er eitt mál í sjálvum sær hjá Javnaðarflokkinum. Eins og eitt framhald av verandi støðu heldur ikki er eitt mál í sjálvum sær.

– Tað eru tey samfelagsligu áhugamálini – gerandisdagurin hjá fólki – sum upptekur okkum. Harvið er ikki sagt, at tað ikki eisini í okkara hjørtum býr eitt ynski um, at føroyingar taka fulla ábyrgd av okkara egna landi. Tað er okkara greiða mál, at vit útbyggja okkara sjálvræði á øllum økjum, men vit síggja eisini fyrimunir í einum samstarvi, segði Jóannes Eidesgaard. Fólkatingsmaðurin hjá Javnaðarflokkurin helt, at gongdin í løtuni er skeiv.

– Um vit siga, at øll hendan gongdin hevur tvey stig, so má fyrsta stig koma áðrenn annað stig. Fyrsta stig er at fyrireika samfelagið at standa á egnum beinum politiskt, umsitingarliga og búskaparliga. Annað stig er fyri okkum sjálvt stigið út úr ríkisfelagsskapinum, um føroyingar til ta tíð halda, at tað er tann besta loysnin. Stutt sagt, er støðan tann, at samgongan ætlar at gjøgnumføra stig nummar tvey, meðan vit vilja gjøgnumføra stig nummar eitt. Vit siga fyrst stig eitt, og so má tíðin vísa, hvat hendir. Ta avgerðina mugu teir føroyingarnir taka, sum til ta tíð hava ábyrgdina av samfelagnum, segði Jóannes Eidesgaard.

## Søguligi møguleikin

Jóannes Eidesgaard kom eisini inn á søguliga møguleikan, sum nógv hevur verið tosað um.

– Vit hava eitt søguligt skeið í føroyskum politikki júst nú. Allir flokkar taka undir við broytingum, og tað er ongantíð hent síðani 1906. Ósemjan snýr seg um, hvussu stórar broytingarnar skulu verða. Men tað finst eisini ein felagsnevnari. Hann gongur sjálvsagt ikki ynskjunum hjá øllum flokkum á møti, men hann ger ein stóran meiriluta av fólkinum nøgdan.

Og Óli Breckmann helt eisini, at partarnir eiga at gera meira fyri at finna eina semju, sum kann fáa so breiða undirtøku sum gjørligt.

– Fullveldið her og nú skilur landsstýrið og stjórnina. Og hetta skilur eisini samgongu og andstøðu í Føroyum. Men lat okkum hyggja at tí, sum í øllum førum Javnaðarflokkurin og samgongan í Føroyum eru samd um. Partarnir eru samdir um at fáa eina avtalu í staðin fyri heimastýrislógina, sum er fólkarættarliga bindandi, og sum Fólkatingið ikki kann taka aftur. Hetta er í øllum førum greið tala. Løgtingið skal verða evsta vald. Føroyingar og danir varðveita rættindini hjá hvørjum øðrum, og ein avtala skal gerast um, at blokkstuðulin minkar yvir eitt nærri ásett áramál, sum allir partar kunnu semjast um.

## Tómrúm

Óli Breckmann vísti á, at tað í løtuni er eitt politiskt tómrúm í Føroyum, sum millum annað kemst av, at heimastsýrislógin er útbrend.

– Tann politiska menningin er ongantíð liðug, verður sagt. Men í Føroyum er hendan menningin tíverri steðga upp. Og hon kemur bert í gongd aftur, um allar góðar kreftir í Løgtinginum og Fólkatinginum finna eina so góða loysn á ósemjuni, at so nógvir føroyingar sum gjørligt halda, at viðurskiftini millum Føroyar og Danmark aftur eru vorðin góð.

Jóannes Eidesgaard heitti somuleiðis á partarnar um at fara fram við virðing fyri hvørjum øðrum. Óansæð um partarnir eru ósamdir um ynskini hjá hvørjum øðrum.

– Hetta skylda vit okkara søguligu fortíð og okkara framtíðar samstarvið.

At enda heitti Jóannes Eidesgaard á partarnar um ikki at lata samráðingarnar draga óneyðuga leingi út.

– Hetta er at kalla tað einasta málið á politisku dagsskránni í Føroyum í løtuni, hóast vit áttu at verið upptiknir av at loysa onnur týdningarmikil mál.

## Halda fram

Poul Nyrup Rasmussen endurtók á røðarapallinum hóskvøldið, at partarnir eru komnir langt í samráðingunum, men at tað framvegis eru nógv mál eftir at loysa.

– Eg havi sagt við løgmann, at vit eru til reiðar at halda fram, segði forsætisráðharrin og legði afturat, at hann hevur fylgt við í orðaskiftinum í Føroyum seinastu tíðina og eitt nú lagt til merkis, signalini, sum eru komin frá millum annað samgongulimum.

– Tað er avmarkað, hvussu langt eg kann fara inn í tað kjakið her, tí tá kann eg koma at leggja meg útí føroyska kjakið. Eg vil bara endurtaka, at vit eru til reiðar at halda fram við samráðingunum á tí grundarlagnum, sum Løgtingið og landsstýrið hava samtykt og enn einaferð vátta, at tað besta fyri Føroyar og okkum er, at so breið semja sum gjørligt er um endaligu loysnina, segði danski forsætisráðharrin.



# Tingfólk eru óprofessionell

*Orsøkin til, at embætisfólk og landsstýrið hava alt valdið í Føroyum er, at tingfólk ikki duga nóg væl at brúka síni aboð. Hetta heldur ein av advokatunum, sum hava gjørt stýrisskipanarlógina*

John Johannessen

Løgtingið hevur allan avgerðarrætt á lóggávuøkinum, og halda tingfólk, at ávís mál krevja drúgva viðgerð árenn tey verða samtykt, skulu tey bara syrgja fyri, at viðgerðin verður drúgv.

Hetta heldur Anfinn V. Hansen, advokatur, sum hevur verið við til at gera stýrisskipanarlógina, sum er galdandi í Føroyum.

Tingfólk hava funnist at, at løgtingið er vorðið ein avgreiðslustova hjá landsstýrinum, sum bert situr og samtykkir tey lógaruppskot, landsstýrið leggur fyri tingið.

Men hesar atfinningar heldur Anfinn V. Hansen vera óneyðugar. Tí tað er løgtingið og eingin annar, ið ger av, hvussu drúgva viðgerð, tey ymisku lógaruppskotini fáa.



*Anfinn V. Hansen heldur, at tingmenn sjálvir kunnu lóggeva soleiðis at embætismenn ikki stýra landinum*

## Kommunulógin kundi bíðað

Eitt tað feskasta dømið um eitt mál, sum er skundað ígjøgnum í løgtininum er broytingin í lógini um kommunuval.

Løgtingið samtykti fríggjadagin endaliga at broyta lógina um kommunuval. Men fyri, at tað kundi bera til at halda kommunuval eftir hesari lógini í november, mátti løgtingið eisini samtykkja eina orðing, sum sigur, at í ár 2000 skal kommunuvalið haldast 21.november. Lógin sigur annars, at kommunuval skal haldast annan týsdag í november.

Hetta hava løgtingsmenn sagt vera at vanvirða tingið. Men Anfinn V. Hansen heldur ikki hald vera í kritikkinum frá tinglimunum.

– Tingið kundi bara svara landsstýrinum, at tað ikki bar til at samtykkja lógina undan kommunuvalinum í ár, og tí mátti kommunuvalið fara fram eftir gomlu lógini, sum hevur virkað í nógv ár, sigur advokaturin.

Boðskapurin frá Anfinn V. Hansen er greiður. Tingið skal bara gera greitt fyri landsstýrinum, at tað er tað, ið er lóggávumyndugleikin og tískil ger av, hvussu og nær lógaruppskot verða avgreidd.

## Nýta ikki serkunnleikan

Tingfólk hava eisini funnist at, at tey ikki hava somu møguleikar sum landsstýrið at leggja fyri tingið væl gjøgnumarbeidd lógaruppskot.

Men hetta heldur Anfinn V. Hansen eisini vera atfinningar, sum einki hald er í.

– Løgtingslimir kunnu nýta alla ta ráðgeving, sum teir ynskja, tá teir skulu smíða lógaruppskot. Tað einasta, løgtingið skal gera, fyri at hetta skal bera til, er at játta nóg nógvan pening á fíggjarlógini til ráðgeving til tingfólk, sigur advokaturin.

Og at fáa hendan peningin játtaðan, heldur Anfinn V. Hansen ikki vera nakran trupulleika, tí tað er jú løgtingið, ið skal góðkenna fíggjarlógina.

# Hava kravt 30-40% í lønarhækkingum

*Í fíggjarmálastýrinum høvdu tey væntað, at tað bleiv lætt at finna semju fyri yvirmenninar á nýggja vaktarskipinum og tey eru bilsin av, at tað gongur so illa*

Áki Bertholdsen

Tað er rættiliga stór ósemja ímillum fíggjarmálastýrið um, hvussu lønarviðurskiftini hjá yvirmonnunum á nýggja vaktarskipinum skulu vera.

Tummas Magnussen, leiðari á lønardeildini í fíggjarmálastýrinum, sigur, at enn eru samráðingarnar ongan veg komnar.

Og hetta kemur púra óvart á hann, tí hann hevði væntað, at hetta fór at verða ein løtt uppgáva.

Men ístaðin er støðan tann, at partarnir eru ikki so frægt sum samdir um, hvat teir skulu samráðast um.

- Vit hava nokk ymiska uppfatan av, hvat hesar samráðingarnar skuldu vera um, sigur Tummas Magnussen.



*Tummas Magnussen á Lønardeildini í fíggjarmálastýrinum er bilsin av krøvunum hjá manningarfeløgunum um, hvussu nógva løn, yvirmenninir á nýggja vaktarskipinum skulu hava*

## Hava kravt 30-40%

Hann sigur, at í Fíggjarmálastýrinum høvdu tey væntað, at samráðingarnar skuldu snúgva seg um, at finna ein hóskandi bólk í sáttmálanum, sum er, at seta manningin á nýggja skipinum í.

– Vit hævdu væntað, at tað skuldi ikki meiri enn ein stuttur fundur til at semjast um tað.

– Hinvegin hava manningarfeløgini lagt krøv fram, sum onki hava við nýggja skipið at gera.

– Teirra krøv byggja á, at lønin sum heild er ov lág.

Tummas Magnussen sigur, at Skipara- og Navigatørfelagið tískil hava lagt krøv fyri Fíggjarmálastýrið um lønarhækkingar upp á millum 30-40%.

Men hetta vil fíggjarmálastýrið ikki samráðast um.

– Slík krøv hoyra heima í teimum vanligu sáttmálasamráðingunum. Men tað eru ikki vanligar sáttmálasamráðingar, vit eru í holt við nú.

– Tað, sum vit skulu samráðast um nú, er at finna ein hóskandi lønarbólk í sáttmálanum sum er, at seta yvirmennirnar á nýggja skipinum í, sigur Tummas Magnussen.

Vit spurdu hann eisini, sum hann heldur, at tað er langt ímillum partarnar.

– Tað mugu vit siga, at tað er. Nú hava vit havt tríggjar fundir, uttan at verða komnir nakran veg, so nakað er ímillum okkum, sigur hann.

-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUTOMAT. Skrás.: 28-06-96 Km.: 78.000 Prísur: 179.600,- Garanti*
TOYOTA COROLLA 1,3 H/B Skrás.: 20-04-99 Km.: 7.000 Prísur: 128.600,- Garanti**
TOYOTA AVENSIS 1,8 SOL L/B Skrás.: 13-01-99 Km.: 28.000 Prísur: 165.600,- Garanti**
TOYOTA COROLLA 1,3 GALLA Sýnaður 12-99 Skrás.: 01-05-95 Km.: 139.000 Prísur: 87.600,- Garanti*
TOYOTA CARINA E 2,0 Gli SED. Skrás.: 30-04-98 Km.: 24.000 Prísur: 167.600,- Garanti**
TOYOTA COROLLA 1,3 GALLA Sýnaður 06-99 Skrás.: 20-09-95 Km.: 72.000 Prísur: 85.600,- Garanti*
TOYOTA CARINA E 2,0 Gli Aut.gear Skrás.: 13-06-96 Km.: 82.000 Prísur: 127.600,- Garanti*
TOYOTA COROLLA 1,3 GLS H/B Skrás.: 16-10-97 Km.: 52.000 Prísur: 110.600,- Garanti*
TOYOTA CARINA E 1,6 CDX Sýnaður 01-00 Skrás.: 16-10-96 Km.: 39.000 Prísur: 117.600,- Garanti*
VOLVO 460 SEDAN Sýnaður 06-99 Skrás.: 25-05-90 Km.: 92.000 Prísur: 48.600,-
TOYOTA CARINA E 1,8 L/B Skrás.: 30-12-93 Km.: 140.000 Prísur: 89.600,- Garanti*
HONDA ACCORD 1,8 Skrás.: 01-11-97 Km.: 53.000 Prísur: 148.600,- Garanti*
TOYOTA CARINA E 1,6 SEDAN Sýnaður 03-00 Skrás.: 30-05-94 Km.: 107.000 Prísur: 98.600,- Garanti*
FORD ESCORT 1,8 DIESEL Skrás.: 13-12-95 Km.: 87.000 Prísur: 78.600,- Garanti*
TOYOTA CARINA 2,0 Gli Sýnaður 03-00 Skrás.: 02-07-90 Km.: 170.000 Prísur: 65.600,-
FORD MONDEO 2,0 AIR-CON Skrás.: 02-07-96 Km.: 52.000 Prísur: 120.600,- Garanti*
TOYOTA CARINA 2,0 Xli Skrás.: 19-10-90 Km.: 122.000 Prísur: 57.600,-
FORD FIESTA 1,8 DIESEL Skrás.: 26-01-96 Km.: 115.000 Prísur: 65.600,-
TOYOTA CARINA 1,6 Xli Sýnaður 09-00 Skrás.: 11-06-91 Km.: 108.000 Prísur: 48.600,-
FORD FIESTA 1,8 DIESEL Skrás.: 27-07-93 Km.: 115.000 Prísur: 58.600,-
TOYOTA COROLLA 1,6 Aut.gear Skrás.: 09-08-95 Km.: 60.000 Prísur: 98.600,- Garanti*
KIA SEPHIA 1,5 Skrás.: 17-04-97 Km.: 59.000 Prísur: 62.600,-
AVHEINTINGARTILBOÐ
TOYOTA CAMRY 1,8 XL Skrás.: 30-06-88 Km.: 240.000 Sýnaður 04-99 Prísur: 15.600,-
TOYOTA CARINA 1,6 DS Skrás.: 09-06-87 Km.: 221.000 Sýnaður 05-00 Prísur: 15.600,-
NISSAN BLUEBIRD Skrás.: 12-06-87 Km.: 157.000 Sýnaður 08-00 Prísur: 17.600,-
NISSAN BLUEBIRD Skrás.: 26-03-86 Km.: 192.000 Prísur: 2.000,-
OPEL ASCONA 1,6 Skrás.: 01-01-87 Prísur: 3.600,-
VW TRANSPORTER Skrás.: 17-02-87 Km.: 190.000 Prísur: 18.600,- V/ DUP. KABINU
SUZUKI BALLENI 1,6 GLX Skrás.: 26-06-96 Km.: 52.000 Prísur: 87.600,- Garanti*
VØRUVOGNAR
TOYOTA DYNA 150 V/ LAST Skrás.: 24-02-97 Km.: 100.000 Prísur: 90.600,-
TOYOTA LANDCRUISER 2,4 DIESEL Skrás.: 05-11-86 Km.: 230.000 Prísur: 48.600,-
VW LT 35 VAN Skrás.: 30-06-93 Prísur: 39.600,-
* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato
Støkkið inn á gólvið!
REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00





Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040
Sosialurin - 311820